Fyrstur við tí seinasta
5 ferðir um vikuna


Sosialurin
Nr. 96 • týsdagur • 22. mai 2001 • 75. árgangur • Kr. 10,00
Dansurin gekk so lystiliga í Havn síða 4
www.sosialurin.fo
Arbeiðsleysur: Jákup er liðugur í Herfølge
Ítróttur, s. 13–28

Ja!

Sjálvandi vil eg halda Sosialin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ________

Bústaður: ________

Postnr.: ________

Bygd/býur: ________

Undirskrift: ________

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn




# Hip Hop á føroyskum

**Lívsglaðir føroyskir ungdómar dansaðu seinasta vikuskiftið Hip Hop Í Hoydølum. Hetta slagið av dansi hevur sínar røtur á amerikansku eysturstrondini, og nú er túrurin eftir øllum at døma komin til Føroya. Leiðarin á skeiðinum hevði bert rósandi orð at bera føroysku dansarunum**

HIP HOP
*Heri á Rógvi*


*Luttakararnir vóru ágýtnir, segði leiðarin á skeiðinum*
*Mynd: Heri á Rógvi*

Staðið var og er Hoydalar. Tónleikurin er við Jennifer Lopez, Lucy Pearl, Madonnu... og Hip Hop dansiskeið er á skránni. Jú, tað er eitt Hip Hop dansiskeið. Hin mentaði øtast kanska ella fer at hugsa um nýbrotið innan nýggjari føroyska mentan.

Hvussu er og ikki, so var eitt skeið á skránni síðsta vikuskiftið. Tað var eitt dansiskeið, eitt hip hop dansiskeið. Eitt rættari sagt eitt hip hop/funk dansiskeið.

Úr Randers, sum liggur í sunnasta partinum av ríkinum, vóru tvær gentir komnar at undirvísa í hip hop dansi. Gentirnar eru tvillingar, og tær eru av kendari ætt innanfyri dans í Danmark. Tær eita Anett og Jeanett Büllow. Báðar sigast tær at vera sera stinnar innanfyri at kalla øll sløg av dansi, og tær hava eisini dansa síðani tær vóru heilt lítlar, umframt at Jeanett hevur undirvíst í gott og væl fimm ár.

Eitt av teimum støðunum, har gentirnar plaga at vera fyri undirvísa er í Sønderborg, sum liggur í suður Jútlandi. Tað var eisini her, at tær báðar komu í samband við føroyingar. Ein av teimu, Ann-Mary á Rógvi Rasmussen tók saman við øðrum stig til at fáa tær hendavegin at hava eitt skeið fyri føroyskum ungdómi. Sigast skal eisini, at undirtøkan fyri skeiðinum var avbera góð. Stívliga 160 ungar gentir og ungir dreingir stríddist, sveittaðu og dansaðu frá síðsta hósdegnum til leygardagin.

Luttakararnir á skeiðinum vóru býttir upp í bólkar eftir aldri, og tað varð til fýra bólkar. Tað var eitt sindur ymisk á hvørjum torleikastigi tað varð undirvíst, men felags fyri allar bólkarnar var, at tey góvu alt tað tey áttu. Henda dagin Sosialurin vitjaði, var tað fyrst tann næst yngsti aldursbólkurin og síðani var tað teir eldstu luttakararnir, ið vit fingu høvi at síggja.

Tað skal eisini sigast, at luttakararnir kláraðu seg óføra væl, serliga tá hugsað verður um, at tað var bert eftir tríggjar dagar og fáar tímar, at luttakararnir sum einki dugdu at fyrihalda seg til kendu hip hop tónarnar.

Tá vit hittu Jeanett Büllow, so hevði eisini góð orð at bera føroysku luttakarunum. Hon segði, at tann rutinan, sum tað lærdu upp á tríggjar dagar, vanliga tekur fleiri mánaðir at læra. Eisini helt hon fyri, at føroysku luttakararnir vóru sera ágrýtnir og dugdu minst líka væl um ikki betri enn danskir javnaldrar.

At enda skal tað eisini nevnast, at eitt tílíkt skeiði væntandi verður aftur á skránni komandi ár.

# Gingu nærum alla oynna á tamb

**Skótar úr Vági og Fuglafirði gingu um vikuskiftið úr Sandvík til Vágs. Mjørkin hevur ligið tjúkkur seinnu dagarnar, men leygardagin seinnapart komu skótarnir vegin fram til Vágs, har pannukøkur bíðaðu**

SKÓTALÍV
*Dagfinn Olsen*

Hósdagin komu skótar úr Fuglafirði til Vágs. Teir høvdu frætt um forvitnisliga ætlan hjá skótum í Vági. Ætlanin var at ganga úr Sandvík til Vágs og so varð gjørt.

## Nátt í fjósi

Hóskvøldið lógu tey nátt í skótahúsinum í Vági. Fríggjamorgun árla fóru tey til Sandvíkar, har túrurin byrjaði. Móti kvøldið vóru tey komin til Trongisvágs. Har lógu tey nátt. Við fjósið hjá Peturi Karl av Rana vórðu tjøld sett upp og leiðararnir reiddu sær ból fjósloftinum.

Leygarmorgun varð hildið avtsað aftur. Seint seinnapart komu tey móð og troytt, men fegin, oman úr haganum og mjørkanum til Vágs. Gingið varð eftir gomlu varðagøtunum og tá tey nærkaðust Vági vóru ellinjurnar eisini stór hjálp. Sum onkur tók til, so høvdu tey gingið tað mesta av oynni, men eisnki sæð vegna mjørka.

Í Skótahúsinum í Vági bíðaðu pannukøkur og køkur teimum troyttu vallarunum.

Túrurin var ein sonevnd Haik, sum skótar nevna tað. Ymsar uppgávur skuldu loysast, m.a. skuldi teinurin verða minst 50 kilometrar, gangast skuldi eftir varðum o.s. fr. Fyri avrikið fáa skótarnir ávíst prógv.

Skótarnir í Vági eru nú bodnir til Fuglafjarðar, tá tað nærkast jólum, har ein haik er á skránni.


*Leygardagin komu skótar úr Vági og Fuglafirði til Vágs, troyttir men fegnir, eftir at hava gingið úr Sandvík*